**Kvæðatilfar - Nr: 09**

# Lærarvegleiðing

**Vegleiðandi floksstig:** allir flokkar

**Uppgávuslag / heiti:** At týða keipur

**Vegleiðing:**

At týða keipur hóskar seg best sum endurtøka, tá næmingarnir kenna til kvæðið.

Næmingarnir eru saman tveir og tveir. Ein greipa tekur eitt ørindi og fer út í gongina. Tey, ið inni sita, vita ikki hvat ørindi greipan tók. Tey, ið sita eftir kunnu t.d. terpa kvæði hvør sær ella við at yvirhoyra hvønn annan. Løtu seinni kemur greipan innaftur og roynir nú við keipum at vísa hinum í flokkinum, hvat ørindi talan er um.

Tað er týdningarmikið at velja hóskandi ørindi. Úr Brestis kvæðnum eru millum annað hesi hóskandi:

Reiður var tá Havgrímur,
hann sær mót Tróndi vendir:
Hví manst tú sum fjøruseyður
reika runt um strendur!

Trýsti hann seg á stungu fram,
blóð úr beni oysti,
høgdi so til Havgrím sterka,
øksl og arm hann loysti.

Deyður dettir Havgrímur
og Brestir omaná.
Beinir berjist menniliga,
tó hann falla má.

Tóri runnu tár á kinn,
harðnar Sigmunds sinni:
"Grátum ikki frændi mín,
vær goymum væl í minni!"

Sveinur svørð úr slíðrum dregur;
Bjarni fram sær skundar:
"Tykir mær so vont eitt verk

**Kvæðatilfar - Nr: 09**

at drepa børn sum hundar.